# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## ES- samstarv - eitt stig tann rætta vegin

Føroyar eru komnar upp í granskingar- og útbúgvingarprogrammini hjá ES. Hetta er uttan iva eitt stórt framstig fyri føroyska gransking. Øll eru samd um, at gransking, menning og innovatión eru forteytir fyri menning av vinnu, búskapi og samfelag. Tað er royndur lutur, at tey lond, sum statsa uppá gransking, menning og innovatión, tey hava framburð og mennast støðugt, meðan lond, ið ikki satsa á hendan hátt, drgana afturút og gerast eftirbátar.

Granskingin er eisini ein sera týðandi liður í Visjón 2015, og er hetta í sjálvum sær ein viðurkenning av tí týdningi, sum hesin táttur hevur fyri føroyska samfelagið. Í øllum londum rundan um okkum henda stórar samfelagsbroytingar. Londini flyta seg frá at framleiða vørur til at framleiða vitan ella framleiðslur við støði í vitan. Samstundis sum henda tilgongd mennist, flyta tær lægstløntu vinnurnar til láglønarlond. Hetta rákið er enn ikki komið til okkum av álvara, men nógv bendir á, at rákið rakar okkum eisini í eini ikki ov fjarari framtíð. Tað ræður tí um at vera á varðhaldi og binda um heilan fingur. Hetta merkir við øðrum orðum, at tað ræður um at vera væl fyrireikaður til hesa nýggju og broyttu samfelagsstøðu. Undir hesum umstøðum eru útbúgving og gransking heilt grundleggjandi og sera týðandi fortreytir. Samfelagið eigur tí uttan dvæl at statsa uppá hesar tættir.

Tað er tí í tøkum tíma, at Føroyar eru komnar upp í granskingarprogrammið hjá ES. Tað er her tað gongur fyri seg. Tað er her pengarnir eru, og her eru øll tey týðandi netverkrini. Luttøkan er heilt einfalt ein fortreyt fyri, at granskingin skal kunna mennast í Føroyum. Hetta er eitt stórt stig tann rætta vegin, og nú er at vóna, at allir viðkomandi partar liva upp til nýggju avbjóðingarnar og møguleikarnar. Føroysk gransking og granskingarumhvørvi eru ikki bert kend fyri dugnaskap og dirvi, men fyri javnt og samt at lata illa at og fyri at gremja seg um vánaligu støðuna. Nú er støðan broytt og nú ræður um ikki at liggja sjóvarfallið av sær. Og síðst men ikki minst: henda nýggja skipan krevur øktar játtanir frá okkara polistisku skipan, men hetta man fara at vera minsti trupulleikin, nú komið er undir land eftir sjabbið tey mongu ár á opnum havi.

**Sosialurin**

## Vestmenningar spyrja: "Hvar er skúlin"?

**BIRGIR WAAG HØGNESEN**
birgir@kallnet.fo



**Vit hava tvey tingfólk, tveir landstýrismenn, ein landsverkfrøðing, men ongan nýggjan fiskivinnuskúla enn**

**Hvar er menningin?**
Vit hava seinastu mongu árini tosað nógv um førleikamenning og gransking. Føroyski flotin er nógv moderniseraður, men fólkini, sum skulu menna okkara fiskaframleiðslu, tey hava enn ikki fingi ein líkinda fiskivinnuskúla.

Tað verður mangan sagt, at vit liva mestsum einans av fiski, men vit skapa ikki neyðugu fortreytirnar fyri at menna okkara førleika innan hesa vinnu. Við hesum førleika kundu vit verið við í fremstu røð, tá ið tað snýr seg um framburð, bæði tøkniliga og innan nýggjar marknaðir.

**Fiskivinnuskúlin: Hvar er hann?**
Heilt frá byrjan hevur fiskivinnuskúlin verið skerdur, men hóast hetta hevur hann ment seg heilt ómetalig nógv. Eg loyvi mær at ivast í, hvussu leingi leiðsla, lærarar og næmingar støðast undir so ósømiligum umstøðum, sum fiskivinnuskúlin hevur og virkað undir.

Skúlin hevur síðan byrjan húsast í trimum sethúsum og nú eisini á einum trolvirki í bygdini, so tað er eyðvitað, at hetta er ikki annað ikki ein lappaloysn, men hvar eru politikkararnir í Norðstreymi?

Tá vit øll hildu, at ljósast sá út, var ætlanin at keypa ein "gamlan" timburhandil, so skúlin kundi fáa líkinda hølir, men her fekk onkur í skipanini forpurrað, at skúlin skuldi liggja í Vestmanna, og tí varð keypið av ongum.

Í samgonguni undan hesari hoyrdist ofta, at fiskivinnuskúlin í Vestmanna skuldi ofrast í eini politiska kabalu og flytast saman við tekniska skúla í Klaksvík, men tá stóðu politisku feløgini í Norðstreymi saman.

Fyri ikki at "missa" skúlan av bygdini, tók Vestmanna Kommuna stig til at bjóða landsstýrinum ókeypis grundstykki inni á Fjørð, og myndugleikarnir tóku av. Men hvar er bygningurin, kundi vit spurt.

**Nýggja samgonga og fýra fólk**
Tá seinasta landsstýrissamgonga varð skipð, var roknað fyri vist, at nú var rokkið á mál við fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Og hvat annað skuldi ein trúgva: Norðstreym fekk heili fimm fólk at ráa yvur, tá ið løgmaður hevði gjørt av, hvør skuldi sita saman við honum í Tinganesi; av hesum fimm átti Vestmanna fýra fólk.

Vestmanna kemur neyvan aftur í ta støðu aftur at fáa fíggjarmálaráharran (Bárður Nielsen), 2 nevndarlimir í mentunarnevndina í Løgtinginum, sum eru Olav Enomoto og Heidi Petersen, og so eisini Hans Paula Strøm, landsstýrismann.

Vit vita, at alt fiskivinnuskúlaprojektið er útbjóðað, og nú alt er innkomið aftur, sigur stjórin í Landsverki, sum eisini er vestmenningur, í viðmerking við fjølmiðlarnar, at innkomnu tilboðini eru ov høg. Hvat er so til ráa at taka hjá stjóranum í Landsverk? Jú, hann kann biða um meira pening frá politisku skipanini at fremja projetið, ella – sum nú er avgjørt – at fáa eina útlendska arkitektafyritøku at meta um projektið, tí so hendir als einki ("Da Fanden ville, at intet skulle ske, da satte han i verden den første komité").

**Tá flest hvørki merkir best ella mest**
Við tveimum tingfólkum, tveimum landsstýrismonnum búsitandi í Vestmanna og einum vestmenningi í stjórastarvinum á Landsverki hevur tað enn ikki eydnast at skøva asfaltið inni á Fjørð, har fiskivinnuskúlin var ætlaður at standa.

Við einum pennastroki gav Torbjørn Jacobsen ordrar undir seinastu samgongu, at Heilsuskúlin skuldi leggjast á Tvøroyri. Fáa vit ein "nýggjan" Tobba út í Tinganes eftir næsta val, so endar fiskivinnuskúlin í eini kabalu, har vestmenningar mugu síggja í eyguni, at tað ikki loysir seg, at hava nógv fólk í longum talvi.

## Nummar 2

Nýggja árið á 15 teimum bestu byrjar við broyting í ovasta enda av listanum, Nummar hjá The Dreams, ið lá á odda, tá listin fór í jólasteðg er nú á øðrum plássi.

Tað er Justin Timberlake og lagið My Love, ið hevur tikið oddasessin frá The Dreams. Tað sum er merkisvert við listanum hesa vikuna, er at einans 4 av teimum fimtan løgunum eru føroysk, hetta hóast jólatíðin hevur verið virknasta útgávutíðin á árinum. Næsta føroyska lagið á listanum er Don't Want You To Wake Up á triðja plássi, meðan Martin Joensen & Hinir við Eivør og lagið Kavin kom liggur á 11. plássi framman fyri Kvølur hjá Villmonnum á 12. plássi.

Ein føroyskur sangari er millum eykaløgini, hetta er tulkingin hjá Kristleif Zachariassen av Number Of The Beast hjá Iron Maiden, ið roynir seg.

## Stanley í Noregi

Hetta vikuskiftið spælir føroyski trubadururin Stanley Samuelsen í Noregi. 3 konsertir í tríggjar dagar í trimum býum.

Fríggjakvøldið kl. 22.00 fer Stanley á pallin í Privaten í Holmsbu, leygarkvøldið kl. 22.30 hjá Bakeren í Åros og sunnudagin kl. 18.00 í Slemmestad Pub. Hetta er aðru ferð seinasta árið, at Stanley vitjar í Noregi. Í fjør í september var Stanley við síni gittar- og sangtrio Vocaltrio Accoustica á konsertferð í Noregi. Hetta var sera væleydnað. Tí roynir Stanley seg nú aftur, hesaferð verður Stanley einsamallur og við egnum tónum, umframt tulkingum av løgum hjá eitt nú The Beatles, Eagles, Crosby, Stills og Nash og Neil Young.

**nud**


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Bjarta Joensen bjarta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo
Teitur Joensen teitur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.